# Kjak



Bjarni Skála

## Tveittur út úr Herberginum

Eg vil bara við hesum vísa á, hvussu harmur er eri um, at nýggi leiðarin í Herberginum hjá Frelsunarherinum hevur tveitt meg á dyr. Eg havi búð har í níggju mánaðir og verið edrúur alla tíðina. Eg hevði tað so gott, og eg var sera fegin um at búgva har.

Eg veit, at øll starvsfólk og øll sum búgva har stuðla mær. Eg havi hildið meg til reglarnar og verið edrúur alla tíðina, meðan eg havi búð har. Nýggi leiðarin segði, at eg skyldaði húsaleigu, men tað var ein lítil trupulleiki, sum eg lovaði at rætta beinanvegin - og sum var ein feilur hjá bankanum.

Nú eri eg ein maður, sum er koyrdur niður í øskuna, og tað harmar meg nógv.






Hans Dávid Dam

## SEV - skynsemi sigraði

Eftir í eina drúgva tíð at hava fyrireika stóra vatnorkuútbygging í Norðurstreymi, boðar nevndarformaðurin í SEV nú frá, at ætlanin fyribils er slept. Vit eru mong sum fegnast um hesa skynsomu avgerð.

At henda mikla náttúruhóttan nú er løgd í eina skuffu gerð, at vit aftur kenna okkum trygg við at landsluturin Norðurstreym varðveitur sítt náttúrumargfeldni, eitt ríkidømi fyri okkum øll og okkara eftirkomarar - Ein avgerð í tænur SEV til miklan sóma.

Málið um munandi øking í grønu orkuframleiðsluni er ikki rokkið við hesi avgerðini, sum heldur má takast sum ein fráboðan um at kósin verður broytt.

Tað er eitt stót stig hjá elfelagsskapi okkara, at sleppa vanahugsan og vera opin og kreativ í mun til stóru tøkniligu framstigini á orkuøkinum sum henda í hesum døgum.

Nærliggjandi er at kanna hvat troytsat kann av orku úr vindi og sjóarfallsstreymi.

Tí streym ynskja vit, enntá býligan grønan streym til okkara støðugt vaksandi orkunýtslu.

So eftir er bert at ynskja SEV eydnu við nýggju skynsomu kósini.

# Hava framvegis brúk fyri donskum

## Opið bræv til mentanarnevnd løgtingsins viðv. ætlaðu broytingunum í lærugreinini danskt

Nú landsstýriskvinnan í mentamálum hevur boðað frá broyttum lærugreinaligum raðfestingum í studentaskúlum og HF-skeiðum og hægri handilsskúlum, er tørvur á rættleiðing og kunning um støðuna. Undirritaðu dansktlærarar eru sera ørkymlaðir viðvíkjandi ætlanunum um, at lærugreinin danskt verður tikin av sum kravd lærugrein.

Grundgevingin fyri broytingina er nýggja avtalan við danska kenslumálráðið, ið viðurkennir føroyskt sum førleikagevandi móðurmálslærugrein á jøvnum føti við móðurmálslærugreinir í øðrum Norðurlondum. Vit fegnast um viðurkenningina, sum føroyskt loksins hevur fingið. Vit skilja tó ikki, at hetta skal vera orsøk til at taka av danskt sum lærugrein.

Danskt inniheldur undirvísing í bókmenta-, lista- og mentanarsøgu, sum ikki beinleiðis kann flytast í føroyskt. Henda undirvísing er neyðug fyri at geva næmingunum innlit í europeisk bókmentalig og hugsjónarlig rák, ið ikki eru umboðaði í føroyskum bókmentum, hvørki upprunaligum ella týddum. Eisini føroysktlærarar vísa á týdningin í hesum, og nýggj phd-ritgerð hevur útgreinað hesi viðurskifti. Undirvísingin í donskum er tískil ein týdningarmikil liður í tí almennandi partinum av studentsútbúgvingini, sum annars tykist vikna í nýggju skipanini.

Danskt gevur næmingunum førleikar at samskifta bæði í skrift og talu í øllum Norðurlondum, gevur teimum lætta atgongd til norðurlendsku mentaninar, og er ein sera týdningarmikil málsligur førleiki hjá teimum mongu av næmingunum (uml. 80-90%), sum velja at lesa í Danmark. Í viðgerðini av málinum higartil hevur mest verið víst til universitetsútbúgvingar, men ein stórur partur av næmingunum taka professiónsútbúgvingar, og eisini har er førleikin í donskum týdningarmikil.

Í Íslandi er danskt kravd lærugrein bæði í fólka- og miðnámsskúlum. Á málsligu deild í íslendsku studentaskúlunum er danskt kravd




lærugrein í 3 ár. Í fjør heyst vóru umboð fyri dansktlærarar í Íslandi á vitjan í Føroyum fyri at kunna seg um undirvísingina í donskum í studentaskúlunum í Føroyum. Tørvurin á undirvísing í donskum hevur verið vaksandi í Íslandi, m.a. tí fleiri og fleiri íslendskir ungdómar velja at taka útbúgving í Danmark og øðrum Norðurlondum. Sambært heimasíðuni hjá Háskóla Íslands velja 65% av teimum íslendingum, sum ætla at lesa uttanlands, at fara til onnur Norðurlond, og av hesum fara 60% til Danmarkar. Ísland er ikki eins tætt knýtt at Danmark og Føroyar, og tí tykist tað løgið og ørkymlandi, at meðan Ísland sum sjálvstøðugt Norðurland arbeiðir við at menna lærugreinina danskt, taka vit lærugreinina av. Hvørki íslendingar ella føroyingar duga danskt av sær sjálvum, og hvørvur danskt sum lærugrein í føroysku skúlunum, fer tað at taka nógv ár at byggja førleikan í donskum uppaftur.

Í øllum Norðurlondum læra tey mál, sum gera tey før fyri at samskifta lætt og neyvt í norðurlendskum høpi, t.v.s. at lærugreinir í skandinaviskum málum eru kravdar í miðnámsskúlunum í øllum Norðurlondum (finnlendingar hava svenskt, íslendingar danskt, grønlendingar danskt o.s.fr.). Tað fer at tykjast marghháttligt, um vit - sum tey einastu - velja eina heilt aðra kós at avmarka okkum til enskt.

Harumframt fer tað at fáa avleiðingar fyri støðið í donskum á Læraraskúlanum og í undirvísingini í fólkaskúlanum, um lærugreinin verður tikin av í studentaskúlunum og HF-skeiðunum og á handilsskúlunum. Hesar avleiðingar kunnu gerast álvarsligar, tá vit hugsa um, at føroyska skúlaskipanin framvegis í stóran mun er treytað av donskum undirvísingartilfari, serliga á miðnámsskúlastigi.

Tað er framvegis brúk fyri undirvísing í donskum í føroyskum studentaskúlum og HF-skeið-um og á handilsskúlum. Nýggja avtalan við danska kenslumálaráðið broytir ikki hetta, men vit hava nú møguleikan at skipa innihaldið í lærugreinini eftir okkara egna tørvi. Okkara tilmæli er tí, at ein nevnd verður sett at viðgera, hvussu innihaldið í lærugreinini danskt skal skipast í nýggju føroysku skipanini.

Við virðing

**Dansktlærarar í føroysku studentaskúlunum og HF-skeiðunum og handilsskúlunum**

*Arnfinnur Thomassen, Marie-Luise Christensen, Birgit Jacobsen, Eivin Simonsen, Nikolina Olsen, Turid Thomsen, Ann Ellefsen, Bjørg Róin, Vár í Ólavsstovu, Gerda Poulsen, Hanne Jacobsen, Rasmus Wiin Larsen, Dorthe Pedersen, Kinna Poulsen, Rakul Napoleonsdóttir Joensen, Hanus Kapilin, Bergur Djurhuus Hansen, Sanna Maria Klein, Hans Andreas Dam Joensen, Randi Benedikte Mohr, Malan Poulsen.*